Fylgiskjal 8

LM-016/2023

**Gudrun Mortansdóttir Nolsøe**

**Fra:** Birita Ludvíksdóttir
**Sendt:** 24. juli 2023 14:15
**Til:** Gudrun Mortansdóttir Nolsøe
**Emne:** SV: TIL UMMÆLIS - Uppskot til broyting í revsilógin (kap 1-11)

Til Løgmansskrivstovuna,

Heilsumálaráðið hevur móttikið niðanfyristandandi lógaruppskot til ummælis. Heilsumálaráðið hevur ikki viðmerkingar til lógaruppskotið.

Vinaliga/Sincerely

Birita Ludvíksdóttir
Løgfrøðiligur ráðgevi/Legal adviser

Heilsumálaráðið/
Ministry of Health
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304050 • Mobile +298 734066
birita.ludviksdottir@hmr.fo • www.hmr.fo

**Fra:** Gudrun Mortansdóttir Nolsøe <gudrunnolsoe@lmr.fo>
**Sendt:** hósdagur, 8. juni 2023 12:33
**Til:** Barna- og Útbúgvingar Málaráðið <bumr@bumr.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>
**Emne:** TIL UMMÆLIS - Uppskot til broyting í revsilógin (kap 1-11)
**Prioritet:** Høj

**Uppskot til broyting í revsilógini (Almennur partur) verður við hesum sent tykkum til ummælis.**
**Freistin at lata inn ummæli er mánadagin 17. juli.**

Hjáheft verður uppskot til broyting av almenna partinum (kap. 1-11) í revsilógini sent tykkum til ummælis. Kapitlarnir eru um hesi evni: Innleiðandi ásetingar, vanligar treytir fyri at nýta revsirættarligu ásetingarnar, treytir fyri revsingarbari, brotsroynd og viðvirkan, revsiábyrgd fyri løgfrøðiligar persónar, revsingarnar, treytað fongsulsrevsing, samfelagstænasta, aðrar rættarfylgjur av teirri revsiverdu gerðini, at áseta revsing og uppathald av rættarfylgjum av teirri revsiverdu gerðini

Lógarteksturin er annars í høvuðsheitum umsettur til føroyskt, umframt at ávísar grundleggjandi broytingar eru gjørdar.

**Kunnu tit hyggja eftir kap. 9, §§ 68 – 69 a, § 71, §§ 73 – 74 a. Tað eru lítlar og ongar broytingar gjørdar í hesum ásetingum, men gott um tit óansæð hugdi eftir hesum.**

Uppskotið inniber yvirskipað hetta:

1) Broytingar í kap. 2: Vanligar treytir fyri at nýta revsirættarligu ásetingarnar
   a. Í hesum uppskotinum verður danskur revsimyndugleiki broyttur til føroyskan revsimyndugleika.
   b. Samstundis verður ein nýggj § 8 c sett inn, fyri at tryggja at tað framvegis er revsimyndugleiki fyri gerðir, sum eru framdar í øðrum pørtum av ríkinum og gerðir, sum eru framdar av ella ímóti øðrum enn ríkisborgarum, sum hava fast uppihald í øðrum pørtum av ríkinum.
   c. Eitt nýtt § 10, stk. 2 verður eisini sett inn, við somu atlitum sum § 8 c

2) Broytingar í kap. 6: Revsingarnar